## Ær í Vági vág 95 pund



Ikki sørt fegnir gjørdust flettingarmenn í Vági í síðstu viku, tá teir flettu eina 5 ára gamla ær. Vektin var 95 pund, og hvørt hetta er met, siga teir seg ikki vita, men teir siga seg ikki hava hoyrt um nakað krov, ið vigar meira. Ærin hevur gingið í Neslíð, ið er millum Vág og Nes. - Um nakar veit um betri vekt, so hevði verið stuttligt at frætt, siga flettingarmenninir í Vági. Johnny Laoretti í Vági átti ærina.

## Krevja millióna endurgjald

500 fyrrverandi starvsfólk í Danske Bank krevja millióna upphædd í endurgjaldi í higartil størsta málinum, sum Finansforbundet hevur ført um starvsfólkapartabrøv. Finansforbundet metir, at tey 500 starvsfólkini skuldu fingið ókeypis partabrøv sum part av teirra starvi, men tað fingu tey ikki, tí tey vóru farin frá ella vóru uppsøgd, tá partabrøvini vórðu útlutað. Danske Bank útlutaði starvsfólka partabrøv fyrstu ferð í 2005, og hetta varð aftur gjørt í 2006, báðu ferðirnar sum ókeypis partabrøv. Finansforbundet metir, at útlutingin er umfatað av Funktionerlógini §17a og málið hevur tí verið elt fakrættarliga vegin. Danske Bank heldur hinvegin ikki, at partabrøvini eru at meta sum løn, og tí er málið lagt fyri dómstólarnar, skrivar boersen.dk.

# Broytir ikki støðuna at Chevron gevst

OLJULEITING

*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fol*



*Petur Joensen, stjóri á Jarðfeingi heldur tað er spell, at Chevron gevst, men tað broytir ikki leitistøðuna á nakran hátt*

-Tað er meira hugaligt at síggja feløg koma inn á landgrunnin, enn at tey rýma. Men uppá stutt sikt broytir hetta ikki nógv uppá leitiviðurskiftini, tí tey verða tey somu eftir at Chevron er farið út. Loyvið verður longt og bindingarnar eru har, men psykologiskt er tað spell.

Hetta sigur stjórin á Jarðfeingi, Petur Joensen, nú Chevron takkar fyri seg.

Petur Joensen sigur seg hava skilt aktuellu støðuna hjá Chevron soleiðis, at tað í løtuni ikki hóskar inn í arbeiði hjá felagnum at vera her. Men afturfyri passar hetta væl inn í strategiina hjá eitt nú StatoilHydro.

-Hvørt oljufeløg velja at arbeiða her, veldst í stóran mun um, hvussu prospektiviteturin hóskar til aktuellu strategiina hjá oljufeløgunum. Og viðurskiftini broytast bæði viðvíkjandi prospektiviteti og strategi, so tað er ilt at spáa, hvat seinni kann henda.

Eitt sterkt felag og hvat so!

-Er tað gott ella ringt fyri leitingina her, at so fá feløg eru eftir og at eitt felag tískil kemur at fevna um so mong loyvi?

-At eitt felag blívur sterkt kann ganga báðar vegir. Ein kann siga, at samráðingarliga stendur tað so sterkari mótvegis myndugleikunum, men tað kann eisini vera til gagns, at eitt felag, sum hevur nógva vitan uppá tvørs yvir allan landgrunnin, fær gagnnýtt ta vitanina.

-Sær tú ongar vandar í tí, at so stórur partur av leitingina liggur mest sum bara á einum felag?

-Sjálvandi er tað óheppið, um tað felagið so vendir tummilin niðureftir. Og tað setir tað í eina sterka støðu. Hinvegin er tað ikki sterkari enn so, tí økini eru áhugaverd, og í so máta standa vit sterk, tí vit hava eina áhugaverda vøru at selja. So javnvágin man vera í lagi.

Uppá fyrispurning um StatoilHydro hevur havt ella fær fyrimunir av at fylla so nógv sigur Petur Joensen, at tað hevur tað ikki.

-Av og á eru treytirnar vit seta oljufeløgunum uppi at venda, her ikki minst kravið til keikantin. Kunnu slík krøv gera sítt til, at eitt nú feløg sum BP og nú eisini Chevron rýma?

-Tað hava vit ikki havt kenslu av. Man hoyrir onkuntíð feløg nevna, at keikantskravið ger tað trupult at virka her. Kann vera at fólkini, sum arbeiða við hesum, kunnu kenna tað sum eina forðing, men avgerðin, um man er í einum øki ella ikki, verður tikin á hægri stað. Er prospektiviteturin til staðar og passar inn í strategiina, so haldi eg ikki, at okkara treytir eru so avskrekkjandi, kanska tvørturímóti.

Petur Joensen heldur avgjørt, at Føroyar framvegis standa sterkar í eini samráðingarstøðu í sambandi við leiting á landgrunninum, tí vit hava nakað at selja. Men enn fleiri feløg gevast her, so verður tað sjálvandi ein steðgur í men neyvan verður tað endin á leiting við Føroyar

Stjórin á Jarðfeingi heldur vit nú eiga at geva komandi brunninum, sum ENI fer at bora á Anne Marie leiðini í apríl næsta ár ans. –Vit eru sera spent uppá henda brunnin.

### Loyvini

Annars henda alla tíðina broytinar ella ajourføringar í einum leitiøki, eisini tí føroyska.

Loyvi 007 er sum flestum kunnugt latið innaftur. Tað var har BP boraði Williambrunnin.

Loyvini 013 og 014, sum Geysir og Atlantic Petroleum standa fyri eru júst longd. Feløgini hava ynski at halda fram og hava lagt arbeiðsprogram fram fyri eini leinging av loyvunum.

Hesi loyvi eru í fyrsta umfari longd fram til 2011 við møguleika at longja tey tvey ár aftrat til 2013. Treytin fyri at leingja er at arbeiðsprogrammini eru nøktandi, og tað váttar Petur Joensen, at hesi eru. Feløgini hava tó ikki bundið seg til nakra boring.

Eitt annað loyvi, sum er longt, er loyvi 002 hjá Føroya Kolvetni, sum liggur tætt upp at Tornadobrunninum, ið varð boraður herfyri og vísti seg at goyma kolvetni.

### Cambo

Gitt hevur verið, at Cambofeltið, sum varð funnið fyri fleiri árum síðani, møguliga gongur tvørtur um markið. Hetta er sjálvandi eitt mál, sum Jarðfeingi tekur í størsta álvara. Sum skilst er hetta eitt av málunum, sum fólkini í Jarðfeingi tosa um í løtuni.

Ein áseting er annars í landgrunnssáttmálanum, sum Føroyar og Bretland hava gjørt, har tað stendur, at tað er upp til føroyingar eisini at taka mál upp, sum m.a. kunnu snúgva seg um fund, sum ganga tvørtur um mark.

-Er hetta ikki nakað fyri okkara myndugleikar at kanna spurdu vit Petur Joensen. Hann vil ikki gera nakra viðmerking til tað málið í løtuni.

### Avbjóðing

Føroyski landgrunnurin er avbjóðandi. Data er avmarkað og so er tað basaltið. Men man fær nýggja vitan, hvørjar ferð seismikkur verður skotin og borað verður báðumegin markið.

-So út frá tí kunnu vit siga, at vit halda fram. Vit vóna sjálvandi, at íløgan vit gera nú betalir seg, sjálvt um tað skulu ganga nøkur ár.

### Satsa ymiskt

-Mong spyrja helst, hvussu tað ber til, at eitt felag sum Statoil verður verandi her, tá onnur feløg sum BP og Chevron rýma!

-Oljufeløg síggja og satsa ymiskt. Vit hava satsað nógv her, og Chevron aðrastaðni. So fáa vit at síggja, hvussu tað eydnast. Vit mugu heldur ikki gloyma, at búskaparkreppan spælir nógv inn. Tí øll oljufeløg merkja, sjálvt um tey hava nógvar pengar, at gjaldførið verður skorið niður. Tað hava stóru oljufeløgini eisini gjørt. Tí er tað ein beinhørð raðfesting, sum fer fram hjá oljufeløgunum eisini. Tann raðfestingin ger, at man fer út onkunstaðni og inn aðrastaðni. Í flestu førum skerja oljufeløgini budgettini í hvussu er, meðan kreppan stendur við.

Rúni Hansen sigur víðari, at tað er ikki óvanligt, at oljufeløg, sum hava tikið seg úr einum øki, seinni fara innaftur í sama øki. Hetta hendi m.a. fyri Statoil í Meksikanska flógvanum, sum fór út fyri nøkrum árum síðani, men seinni fór innaftur og hevur havt stóra succes. Tað er oftani at meta sum ein svinghurð, har man fer út og inn, men tá samanumkemur veldst um, hvar man sær møguleikar og hvussu man raðfestir.

### Dyrnar opnar

-Skuldu tit verið so hepnir at funnið olju og gass, standa so dyrnar opnar aftur fyri BP, Chevron og øðrum?

-Er man so heppin, so hava vit nógv øki, har oljufeløg kunnu koma inn og hjálpa okkum at bora brunnar og harvið taka ein part av váðanum á seg. So tað er ein partur av strategiini.

Vit hjá StatoilHydro arbeiða saman við fleiri øðrum feløgum á fleiri av loyvinum á Føroyaøkinum, men nøkur øki standa vit einsamøll fyri. Har ætla vit ikki at bora og taka allan váðan á okkum. Tey fara vit so at selja út av, men um tað fer at eydnast vita vit ikki.

-At ein føroyingur situr sum ein av teimum leiðandi fyri leiting í Europa hjá Statoil hevur tað nakað at siga fyri, at felagið er meira virkið her?

-Tað veit eg ikki. Tað verður hugt professionelt at øllum økjum og møguleikum. Hetta verður gjørt tí tað er ein handilsligur møguleiki. Vit hava fastar mannagongdir.

-At tit hava bundið tykkum til so mong loyvi hevur tað gjørt, at tit hava fingið fyrimunir og framíhjárættindi her?

-Tað haldi eg avgjørt ikki. Vit hava ikki bara fingið loyvini. Vit skulu eisini binda okkum til at lata nógvar pengar, tá vit hava fingið hesi loyvi. Vit hava brúkt nógvar pengar uppá loyvini, og tað kann vónandi koma øllum her til góðar eisini. So tann vitanin vit hava fingið til vega verður verandi ogn hjá føroyingum, um vit gevast.

-So tann íløgan, sum verður gjørd, fer ikki burtur aftur. Onkur annar kann brúka hana.

### Rosebank og vit

-Verður Rosebank økið útbygt hinumegin markið, metir tú so at hetta fær týdning fyri okkum?

-Nú er endalig avgerð enn ikki tikin til útbygging. Men løtan er komin til at taka hesa avgerð og verður útbygt, so koma vit at hava eitt stórt framleiðandi felt beint hinumegin markið, og tað ger sjálvandi, at minni felt, sum man finnur nærhendis, kunnu bindast uppí hesa framleiðsluna og her sipar Rúni Hansen til møguligar oljukeldur á føroyska landgrunninum.